STEVNUTILBOÐ
HAVALAMPUR -30%
ZINK OG KOPAR HAVAKRUKKUR -30%
YMISKAR LEIKUR -25%
STØKK INN Á GÓLVIÐ OG SÍGGJ OKKARA STÓRA ÚRVAL
Handilin á kajuni í Hvalvík • Tel. 422 394
sp/f O.K. HEILSØLA & MASKINUR
Sosialurin 141600

VARPIÐ
Skráir og ummælir 16 síður Hvønn fríggjadag
SvF • DR1 • DR2 • BBC Prime • Canal+ • Canal+ Gul • Canal+ Blá TV • Danmark 1 • TV Danmark 2 • 3+ DK 4 • TV 1000 • TV3 dk • Animal Planet • BBC World • CNN • Cartoon Network • Discovery Channel Euro Sport • MTV • National Geographic • TCM • Travel Channel • VH1 • TV2 Zulu • GOD Channel • Lindin • Útvarp Føroya • Rás 2

NORÐURLANDAHÚSIÐ TILTØK APRÍL 2004
SKRÁIN VIKA 25–26
Leygardagur 19. juni
Kl. 19.30 Summartónar 2004 - Konsert við Det Jydske Ensemle (DK)
Atgongumerki verða seld í Kunningarstovuni í Havn og í Norðurlandahúsinum
Mikudagur 23. juni
Kl. 19.30 Summartónar 2004, Aldubáran (FO), konsert
Atgongumerki verða seld í Kunningarstovuni í Havn og í Norðurlandahúsinum
Norðurlandahúsið er opið gerandisdagar kl. 10.00-18.00 og sunnudagar kl. 14.00-18.00
NORÐURLANDAHÚSIÐ Í FØROYUM
Telefon nr. 317900 · Telefax nr. 319790
www.nlh.fo · e-mail: nlh@nlh.fo
Sosialurin 141600

Skrá fyri sundalagsstevnuna

í Hvalvík og Streymnesi 17. til 20. juni

Hósdagin 17. juni

kl. 19.00	Stevnubingo á skúlaloftinum

Fríggjadagin 18. juni

kl. 19.00	Súkklukapping fyri vaksin
kl. 20.00	Súkklukapping fyri børn
kl. 20.00–24.00	Tivoli, karusell o.a. í skúlagarðinum
kl. 20.00–22.00	Barnadiskotek í teltinum
kl. 20.00–04.00	Tarvur í skúlagarðinum
kl. 20.00–04.00	Pylsuvognur í skúlagarðinum
kl. 23.00–04.00	DJ-show í teltinum
	Bussur koyrir í sambandi við Dj-show: kl. 23.00 úr Vestmanna, Tórshavn, Fuglafirði, Strondum og Eiði. Kl. 24.00: úr Tjørnuvík. Úr Hvalvík aftur kl. 04.30

Leygardagin 19. juni

kl. 12.00	Grandprix kapping í renning fyri vaksin og børn 4. umfar vaksin, 3. umfar børn
kl. 13.45	Skrúðgonga. Skótar og ítróttarfólk ganga frá gamla skúla til kommunuskrivstovuna, har hornorkestrið hjá GHM spælir
kl. 14.00	Sundalagsstevnan 2004 verður sett av Heidi Petersen, løgtingskvinnu. Aftaná á fer skrúðgongan út á keiøkð
kl. 15.00	Kappróður. Eftir kappróðurin handar Jørgen Niclasen, løgtingsmaður, steyp og heiðursmerki til vinnandi bátarnar
kl. 15.00	Tombola, sjórænaraskip og matsøla á Kappróðrarøkinum
kl. 15.00	Grand prix í súkkling
kl. 19.00	Trøllapætur og Omman í teltinum
kl. 19.00–22.00	Matsøla í skúlanum
kl. 19.00–02.00	Tivoli, karusell o.a. í skúlagarðinum (Stongt millum kl. 23.00–24.00)
kl. 20.00–04.00	Tarvur í skúlagarðinum (stongt millum kl. 23.00–24.00)
kl. 20.00–04.00	Pylsuvognur í skúlagarðinum (stongt millum kl. 23.00–24.00)
kl. 20.00	Útimøti við missiónshúsið við luttøku av Finni Hansen v/ familju
kl. 23.00	Midnáttarrøða við kommunuskrivstovuna. Heðin Zachariasen, borgarstjóri, heldur røðu og Sundalagskórið syngur. Aftaná verður fýrverk
kl. 24.00–04.00	Dansur í teltinum. Tvøramenn spæla. Bussur koyrir í sambandi við dansin: Kl. 23.30 úr Vestmanna, Tórshavn, Eiði og Tjørnuvík. Úr Hvalvík aftur kl. 04.30

Sunnudagin 20. juni

kl. 12.00	Kirkjugudstænasta v/ Ingu Poulsen Dam, presti
kl. 14.30	Sunnudagsskúli í Missiónshúsinum
kl. 15.00	Kappsigling á kappróðrarøkinum. Aftan á verða steyp handað í neystinum hjá HSR í Streymnesi. Tilmelding fer fram á tlf. 314080 ella 212323 til leygardagin
kl. 15.00	Neytamykjukapping
kl. 16.00–18.00	Ponyríðing við skúlagarðin
kl. 16.00–22.00	Tivoli, karusell, tarvur o.a. í skúlagarðinum
kl. 16.00–22.00	Pylsuvognur í skúlagarðinum
kl. 16.00–20.00	Matsøla í skúlanum
kl. 16.00	Skúlabørn í Hvalvíkar skúla hava tónleikaframførslu á skúlaloftinum
kl. 18.00	Útimøti við missiónshúsið við luttøku av fólki úr Haldarsvík og Tjørnuvík
kl. 19.00	Togtogan millum hvalvíksmenn og streymnesmenn um ánna við skúlan
kl. 22.00	Stevnan endar

Sunleif høvuðspersónur á stórum festivali

Tónaskaldið Sunleif Rasmussen verður stóra navnið á stóra Korsholmsfestivalinum í Finlandi, sum verður í døgunum 28. juni til 5. juli. Tíggju verk hjá tónaskaldinum verða framførd – harímillum ein frumframførsla av einum stykki, sum er skrivað til endamálið

FESTIVALUR

Solby A. Eliasen
solby@sosialurin.fo

Sunleif Rasmussen verður høvuðsnavnið á stórum, finskum tónleikafestivali um mánaðarskiftið

Savnsmynd

Song of Seasons er ein violinsolo, sum Sunleif hevur skrivað til finska festivalin. Hann lýsir hetta stykkið sum eina nýmótans viðmerking til tær fýra árstíðirnar hjá Vivaldi.

Fyrireikararnir av festivalinum settu seg í samband við Sunleif fyri góðum tveimum árum síðani, og samstundis bíløgdu tey so eina violinsolo. Hetta stykkið verður so sum sagt frumframført á festivalinum við einum violinsolisti saman við einum strúkiorkestri.

Sunleif sjálvur fer at hoyra stykkið fyri fyrstu ferð til eina roynd undan festivalinum.

Hann skal til Finlands týsdagin, og tá fær hann so høvi til at hoyra tað. Og tað er hann sum vera man sera spentur uppá.

– Eg sendi teimum stykkið síðst í mai, og eg havi onki hoyrt aftur frá teimum. Tað taki eg sum eitt positivt tekin, sigur hann flennandi.

Tíggju stykki

Sunleif er sum sagt høvuðsnavn á festivalinum, og verða ikki færri enn tíggju verk hjá honum á skránni. Hetta sær hann sum, at fólk fara at fáa ein breiðan kunnleika til tónleikin og stílin hjá sær.

Tað eru ymisk verk umframt Song of Seasons. Báðar strúkikvartettirnar hjá honum, soloir fyri violin og klaver og kamarstykkir í heila tikið.

Í longd variera stykkini frá umleið 10- 15 minuttum upp í 45 minuttir. Song of Seasons varir umleið hálvan tíma, greiðir Sunleif frá. Orkesturleiðararnir hava sjálvir valt stykkini hjá honum burturúr útfrá einum úrvali, sum forlagið hjá Sunleifi hevur sent teimum.

Spennandi

Hóast hann heldur tað altíð vera spennandi at hoyra, hvussu nýggir tónleikarar tulka hansara stykki, so er ongin ivi um, at Sunleif er mest spentur uppá frumframførsluna.

– Sjálvandi er tað mest spennandi, men tað er eisini stuttiligt og áhugavert at hoyra tær smærru broytingarnar í tulkingunum hjá nýggjum tónleikarum, sum framføra stykkini hjá einum, sigur Sunleif.

Hann greiðir frá, at einaferð spældi ein breti sama klaverstykki, sum eisini verður at hoyra á festivalinum.

Einastaðni í stykkinum hevur Sunleif skrivað, at tað skal spælast so skjótt sum gjørligt. Men tá hann so hoyrdi bretan spæla tað, varð hann noyddur at biðja hann slappa eitt sindur av, tí hann spældi tað nógv skjótari enn Sunleif hevur ímyndað sær, at nakar kundi.

– Hann hevði ein fantastiskan teknikk, og eg trúði veruliga ikki, at nakar kundi spæla so skjótt, men tað var eitt stuttligt upplivilsi, greiðir Sunleif frá.

Lopfjøl

Sunleif ásannar, at hetta kann vera enn ein lopfjøl hjá honum út um landoddarnar við sínum eyðkenda tónleiki.

– Hetta er eitt gott høvi at gera vart við seg, og tað eru ikki bara finnar og sviar, sum verða har. Til tílíkar koma ofta fólk alla møguliga staðnis frá, og tað kann jú bara vera gott, staðfestir hann.

Tvey onnur tónaskald verða nógv spæld á festivalinum. Talan er um tveir kekkar frá 20 øld, so sum Sunleif sigur, at hann verður tann einasti av teimum trimum, sum verður tilstaðar og sleppur at hoyra framførslurnar av hansara egnu verkum.

Korsholmfestivalurin varir sum sagt í eina viku, og tað verða tríggjar konsertir um dagin hvønn dag. Millum fyrrapartskonsertina og seinnapartskonsertina verður so eitt sokallað prát um tónleikin á skránni. Har kunnu áhoyrararnir koma inn og lýða, hvat teir ymsu tónleikararnir halda um tónleikin. Og so verður ein konsertfrøðingur eisini tilstaðar. Tann eina dagin verður tað so Sunleif, sum kemur at verða har sum konsertfrøðingur.

Hetta er aðru ferð, at Sunleif Rasmussen er høvuðsnavn til ein festival. Fyri trimum árum síðani var hann tað eisini til Musikhøstfestivalin í Odense. Men tann festivalurin er nakað væl minni er Korsholmsfestivalurin.

Sunleif fer til Finlands týsdagin og verður á festivalinum allatíðina.

Til Kuba at spæla sjónleik

Í døgunum 19. og 20. juni fara børn á Dramaverkstaðnum við barna og ungdómssjónleiki at framføra sjónleikin Valhøll. Sami bólkur skal í juli luttaka á altjóða barnasjónleikarastevnu í Havanna á Kuba

TÍÐINDASKRIV

Solby A. Eliasen
solby@sosialurin.fo

Miðskeiðis í julimánaði fara 14 børn og ung frá Dramaverkstaðnum til Havanna á Kuba at framføra sjónleikin Valhøll á einari altjóða barnasjónleikarastevnu

Síðani september í fjør hava 14 børn arbeitt við og vant sjónleikin Valhøll, sum Hjørdis Johansen hevur leikstjórnað.

Leikararnir eru millum 11 og 14 ára aldur, og eru tey sett saman av næmingum, sum hava gingið á Dramaverkstaðnum í minsta lagi trý ár.

Tey ungu hava við improvisatiónum givið hugskot til tey ymsu brotini. Leikurin er evnaður til úr tilfari frá Vølvuspá, ymsum bókum um norrønu gudalæruna og teknirøðini Valhøll.

Til ber at síggja, hví børnini Røskva og Tjálvi noyðast at fara til Valhøll við Tóra og Loka, og hvussu tey klára seg millum gudar og jatnir. Leikurin nemur við mangt stuttligt og vandamikið, sum hendir hjá gudunum í Valhøll og hjá jatnum í útgarði. Og so er tað Kvarkur, sum fær alt at gerast ein hurlivasi, har hann er.

Til Kuba

16. juli fer bólkurin avstað til eina altjóða barnasjónleikararastevnu í Havanna á Kuba, og tey koma heima aftur 28. juli. Tað eru 24 lond sum luttaka á hesi barnasjónleikarstevnuni sum hevur heitið: The Children are the Hope of the World.

Øll londini framføra sjónleik eina ferð hvør, og spælt verður fyri hvørjum øðrum og fyri almenningínum í stórum sjónleikarhúsum. Afturat hesum skulu børnini luttaka í undirvísing hvønn fyrrapart á verkstøðum við sjónleiki/-drama, gykli, dansi, sangi og nógvum øðrum. Eisini vera útferðir, veitslur og svimjing.

Tað er International Amateur Theatre Association (AITA/IATA) sum er limur í UNESCO sum stendur aftanfyri stevnuna, og er hon annaðhvørt ár ymsa staðni í heiminum. Fyri at luttaka skal videoband sendast inn av leikinum, og altjóða nevndin í AITA/IATA velur so hvør skal luttaka.

Føroyingar mugu sigast at hava verið sera heppin, tí hetta er aðru ferð, at tey eru vald út. Seinast var í Lingen í Týsklandi. Ta ferðina var tað við leikinum Kópakonan sum Hjørdis Johansen eisini hevur skrivað.

Dramaverkstaðið

Dramaverkstaðið, sum samstarvar við Tórshavnar Kvøld- og Ungdóms- og listaskúla hevur nú í sjey ár skipað fyri skeiðum og tiltøkum fyri børnum, ungum og vaksnum í gamla orgulverkstaðnum hjá verland Johansen, sum liggur á veg niðan í ítróttarhøllina á Nabb í Havn.

Dramaverkstaðið er eitt áhugafelag fyri børn, ung og vaksin, sum ynskja at fáa við sjónleik. Hetta skúlaárið hava 90 næmingar gingið á drama/-sjónelikarskeiðum, og tey hava verið býtt upp í seks bólkar. Fýra av bólkunum hava havt sjónleikasýningar í mai og juni. Og nú skulu so tey seinastu hava sýningar av hesum leikinum, sum eitur Valhøll.

Í leikinum er sjónleikur, bardagi á palli, dansur, sangur og tónleikur/ljóðmyndir.

Pallurin er sera einfaldur, og skift millum umhvørvini verður gjørt við ljósabroytingum.

Tónleikur /ljóðmyndir hevur Magnus Johannessen gjørt. Ljós stendur Christian Kruse fyri og leikstjórna hevur Hjørdis Johansen.

Búnar hava Ebba Sofia Kruse, Hjørdis Johansen, Lív Mikkelsen, Birita Kjærbæk og foreldur seymað.

Leikarar: Anfinn Garðshorn, Bára Dybczak, Bára Sigmundardóttir, Barbara í Stórustovu, Dís Jespersen, Eva Jóhanna Garðshorn, Eyð Joensen, Ingilín Strøm, Irena Joensen, Jóhannus Johansen, Maria Heinesen, Marin Tórgarð, Tjóðhild Patursson, Tróndur Dalsgarð.